UTTAN ÚR HEIMI

## Arbeiðspláss hvørva

Ein uppgerð, sum Handilsháskúlin í Bodø hevur gjørt, vísir, at hetta seinasta árið eru næstan 3.000 arbeiðspláss horvin í Norðurnoregi.

Erlend Bullvåg, sum hevur kannað gongdina, sigur við Nordlys, at í dag eru 2.840 færri arbeiðspláss í Norðurnoegi enn fyri einum ári síðani. Í Troms eru 620 arbeiðspláss farin, í Nordlandi 1.700 og í Finnmørkini 520. Hann sigur, at tey flestu arbeiðsplássini eru horvin í framleiðslu- og tænastuvinnuni, og hann roknar við, at hendan gongdin fer at halda fram næsta ár.

Bjørn Olsen, sum er professari á Handilsháskúlanum í Bodø, sigur við Nordlys, at gongdin hetta seinasta árið kann koma Norðurnoregi illa við. Hann vísir á, at førleikin hjá teimum norðurnorsku virkjunum verður nógv skerdur, og tí verður landsparturin illa fyri, skuldi búskapargongdin vent til tað betra. Hann ásannar, at nógvar fyritøkur hava tað trupult, men heldur, at leiðslurnar eiga at royna at finna aðrar loysnir enn at spara seg burtur úr trupulleikunum, tí tað kann koma virkjunum aftur um brekku seinni.

## Ikki so ringt kortini

Í Danmark varð roknað við, at nógv fólk fóru at rýma úr býnum Farum á Norðursælandi, tí kommunan varð noydd at hækka skattin fyri at lúka treytirnar, sum innanríkisráðið setti henni eftir gøluna við fyrrverandi borgarstjóranum Peter Brixtofte.

Men nú vísir tað seg, at tað gongur júst tann øvugta vegin. Skattahækkingin hevur havt við sær, at húsaprísurin í Farum er ikki hækkaður so nógv sum aðrastaðni í Danmark,og tað ger, at fólk aðrastaðni velja at keypa sær hús í Farum og at flyta hagar, skrivar Politiken. Talan er serliga um fólk, sum arbeiða aðrastaðni á Norðursælandi ella í Keypmannahavn, og í fleiri førum er talan um ung fólk við børnum, skrivar blaðið. Og tað hendir, sjálvt um tað tykist greitt, at tað verður dýrari at hava børn á ansingarstovni í Farum, enn tað hevur verið.

Heldur ikki tey, sum leiga íbúðir, tykjast lata seg ávirka av skattahækkingini, tí í hesum bólkinum eru fráflytingarnar ikki fleiri í ár, enn tær hava verið onnur ár.

## 13.000 doyðu

Ein amerikanskur granskarabólkur er komin eftir, at kríggið í Irak kostaði 13.000 irakum lívið.

Granskararnir í bólkinum "The Project on Defence Alternatioves" siga, at av teimum 13.000 irakunum, sum doyðu í krígnum, vóru 4.300 sivilfólk. Bólkurin hevur kannað tað, sum hendi í Irak í tíðarskeiðinum frá 19. apríl til 1. mai við upplýsingum frá amerikonsku herleiðsluni, irakskum sjúkrahúsum og altjóða fjølmiðlum.

Ein annar granskarabólkur, IraqBodyCount hevur fyrr mett, at millum 7.768 og 9.578 sivilir irakar doyðu í sjálvum krígnum. Amerikanska verjumálaráðið hevur fyrr sýtt fyri at geva eitt boð uppá, hvussu nógvir irakar doyðu í sjálvum krígnum í Irak, og Pentagon hevur heldur ikki viljað gjørt viðmerkingar til tølini hjá teimum báðum granskarabólkunum.

## Børn funnin deyð

Fólk í Fraklandi eru skakað av tíðindunum um, at ein bóndi har eysturi í landinum hevur funnið líkini av fýra nýføðingum. Bóndin fann líkini í einum skógi nærhendis býnum Mulhouse.

Løgreglan sigur, at líkini hava eftir øllum at døma ligið í skóginum í fleiri vikur. Upprunaliga varð hildið, at talan var um eitt lík, men læknakanningar staðfestu skjótt, at leivdirnar vóru av fýra børnum. Læknarnir hava eisini staðfest, at øll fýra børnini vóru á lívi, tá tey vórðu fødd, men nær tey vórðu fødd, ber ikki til at siga.

Løgreglan veit ikki, hvør kann hava lagt tey fýra líkini út í skógin, og hon hevur heldur eingi spor at ganga eftir. Men málið er sera álvarssamt, og tí hevur løgreglan sett ellivu serkøn løgreglufólk at taka sær av tí, skrivar AFP.

# USA má fáa frið í Irak innan seks mánaðir



*Bilbumbur og sjálvmorðsbumbur eru næstan gerandiskostur í Irak. Tað hevur skund hjá amerikanarunum at basa mótstøðuni. Annars fáa teir eisini tað irakska fólkið ímóti sær*

**Eydnast tað ikki amerikanarunum at basa mótstøðuni í Irak innan eitt hálvt ár, er vandi fyri, at irakska fólkið fer í part við mótstøðuni, siga hernaðarligir serfrøðingar.**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Blóðbaðið í Bagdad teir seinastu dagarnar ger, at tað hevur skund hjá amerikanarunum at fáa bilbukt við mótstøðuna í Irak. Serfrøðingar ávara um, at eydnast tað mótstøðubólkunum at fáa fótin fyri seg, er vandi fyri, at teir fara at taka seg saman í størri eindir.

Spurningurin er, hvat amerikanararnir skulu gera. Amerikanska herleiðslan hevur gjørt av at skerja eftirlitið í gøtunum í Bagdad og aðrastaðni, nú muslimar halda føstumánað. Tað verður gjørt fyri ikki at órógva irakar, sum koma saman at biðja, men tað eru tey, sum halda, at avgerðin kemur teimum víðgongdu mótstøðumonnunum væl við, tí hetta er næstan tað sama sum at bjóða teimum at gera meiri um seg. Amerikanararnir kunnu eisini velja at fara harðari fram, men vandin við tí er, at irakska fólkið fer at missa álitið á amerikonsku fráboðanini um, at málið er eitt opið og frítt irakskt samfelag.

Ein stórur trupulleiki hjá amerikanarunum er, at teir vita ikki, hvør fíggindi teirra í Irak er, og seinastu tíðina hava amerikanskir generalar alment viðgingið, at teir eru ósamdir um, hvør fíggindin er. Summir halda, at tað eru heilagir stríðsmenn úr øðrum muslimskum londum, meðan aðrir halda, at hesir eru bara ein lítil partur av mótstøðuni.

Tá sjálvt kríggið var av, gjørdu amerikanararnir av at uppløysa irakska herin og løgregluna. Meiningin var ivaleyst góð, men seinni hevur tað víst seg, at tað var eitt stórt mistak at uppløysa løgregluna. Ein av limunum í irakska stjórnarráðnum, Iyad Allawi, segði fyri nøkrum døgum síðani við altjóða fjølmiðlar, at amerikanska avgerðin hevur gjørt, at tjóvar og aðrir brotsmenn hava næstan frítt at fara í landinum, og sjálvir hava amerikanararnir ikki nóg mikið av hermonnum til at loysa tær vanligu løgregluuppgávurnar.

Hernaðarligir serfrøðingar eru samdir um, at amerikanararnir hava skund. Fáa teir ikki bast mótstøðuni innan seks mánaðir, fer irakska fólkið eisini at venda sær ímóti teimum, og so er ilt at siga, hvat kann henda, siga teir sambært Aftenposten.

# Keypa børn til ættleiðing

**Norskir myndugleikar hava illgruna um, at børn í Kolombia verða keypt og síðani ættleidd av landinum.**

BARNAHANDIL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í hálvt annað ár hevur uttanríkisráðið í Oslo biðið myndugleikarnar í Kolombia um eina frágreiðing um mannagongdina, sum verður nýtt, tá børn á privatum kolombiskum barnaheimum verða ættleidd av landinum.

Enn er eingin frágreiðing komin, og tí hava norsku myndugleikarnir gjørt av, at fyribils verða ikki fleiri børn, sum eru á privatum kolombiskum barnaheimum, ættleidd til Noregs.

Upprunin til málið er, at norskir myndugleikar hava illgruna um, at tey privatu barnaheimini keypa børn frá foreldrunum og ættleiða tey síðani av landinum. Barnaheimini krevja 42.000 norskar krónur fyri hvørt barnið. Tað eru nógvir pengar í Kolombia, har nógv fólk eru fátæk.



# Jóan Petur vann danska kokkakapping

**22 ára gamli Jóan Petur á Stongunum vann leygardagin eina kapping fyri kokkalærlingar í Danmark. Í eina heila viku áðrenn kappingina vandi hann frá morgni til myrkurs**

VINNARI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað er pinnastilt inni í køkinum á Kokkaskúlanum í Ålborg hendan leygardagin. Fyrrapartur er, og 24 kokkalærlingar ganga og mala um beinini á hvørjum øðrum. Ongin sigur eitt orð. Konsentratiónin er í topp.

Ímillum hesar 24 kokkalærlingarnar gongur Jóan Petur á Stongunum úr Havn. Hann er kokkalærlingur eins og hinir, og tað er ikki uttan orsøk, at hann er í Ålborg hendan leygarmorgunin. Hann hevur nevniliga teknað seg til Nordjyllands Mesterskab fyri kokkalærlingar saman við dananum Ronny Emborg.



*VINNARI: 22 ára gamli Jóan Petur á Stongunum úr Havn vann um vikuskiftið Nordjysk Mesterskab fyri kokkalærlingar í Ålborg í Danmark*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Spennandi matgerð

Á matskránni í morgun stendur seiður til forrætt, kálvafilét og høsnarungabringa til høvuðsrætt og sjokulátamousse kemur sum rosinan í pylsuendanum.

Næmingarnir eru býttir upp í lið við tveimum lærlingum í hvørjum liði, og teir skulu innan fýra tímar hava gjørt eina menu uppá tríggjar rættir til teir fýra kokkarnar í beinhørðu dómsnevndini. Teir fáa allir útflýggja somu ráðvørurnar, og skulu síðani sannføra dómararnar um, at teir hava uppiborið gullheiðursmerkið og silvurborðiskin.

– Trýstið í og við, at tú skal matgera uppá tíð ger tað spennandi, greiðir Jóan Petur frá.

Kappingin hevur verið til í eini átta ár, og hon er vaksin, so hvørt sum árini eru liðin. Tá hon av fyrstan tíð byrjaði, mátti skúlin spyrja um kokkalærlingar høvdu hug at vera við. Í dag verða uppskriftir sendar inn til skúlan, har skúlin so verður noyddur á sálda næmingar frá, tí áhugin er so stórur.

Hetta er fyrsta ferðin ein føroyingur hevur verið við í Nordjyllands Mesterskab fyri kokkalærlingar.




*LÆRLINGUR: Jóan Petur hevur verið á Hotel Hafnia í læru í hálvt annað ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Vant nógv

Sum kokkalærlingur ert tú í Danmark á skúla einaferð um árið í 10 vikur. Seinast Jóan Petur var á skúla, hitti hann Ronny Emborg, og teir tosaðu so um at fara til hesa kappingina saman. Teir sluppu ígjøgnum hørðu upptøkukrøvini, og eina viku áðrenn sjálva kappingina fór Jóan Petur til Danmarkar fyri at venja.

– Vit vandu nógv. Hvønn dag frá tíðliga á morgni til seint á kvøldið. Í fyrstuni tók tað, sum vit skuldu gera, eini sjey tímar at fyrireika, og tú skalt jú klára tað innan fýra, sigur Jóan Petur.

Men venjingin var miðvís, og tað gav eisini úrslit.

– Vit royndu fyrst at gera forrættin ígjøgnum nakrar ferðir. Síðani høvuðsrættin og so dessertina. Til endans royndu vit at gera alla matskránna ígjøgnum nakrar ferðir.

Jóan Petur og Ronny høvdu ongantíð arbeitt saman áður, so tað skuldu eisini fáast uppá pláss. Hvussu alt skuldi gerast, og hvør skuldi gera hvat.

### Nógv uppfyllast

Kappingin er skipað saman við eini kapping fyri tænarar. Áðrenn hon byrjaði fingu kokkalærlingarnir hvør sín tænara, sum skuldi servera matin fyri dómarunum.

Nógv krøv skulu uppfyllast, men tað týdningarmesta er tíðin, útsjónd og smakkur. Harafturat koma nógvir aðrir smálutir, sum til dømis um borðiskurin er heitur og so framvegis.

Umframt teir fýra dómararnar, sum allir eru kokkar í Danmark og limir av Køkkenchefernes Forening, gekk ein dómari runt í køkinum. Hann skuldi kanna, hvussu maturin varð gjørdur, reinføri o.s.fr.

### Fyrsta plássið

Tað gekk væl hjá Jóan Peturi og Ronny hendan leygarmorgunin. Tíðin varð yvirhildin, og tann harða venjingin byrjaði nú at geva bonus.

– Vit vóru í rættiliga góðari tíð, so vit sóu, hvussu hini byrjaðu at renna runt í køkinum, tá tíðin fór at ganga undan, greiðir Jóan Petur frá við einum lítlum smíli.

Á middegi var øll matgerðin liðug, og klokkan trý seinnapartin varð vinnarin kunngjørdur. Og frammanfyri 22 øðrum kokkalærlingum, struku Jóan Petur og Ronny avstað við fyrsta plássinum.

– Eg skal ikki siga, at eg hevði væntað tað, men sjálvandi vónar ein, at tað gongur so væl sum møguligt, sigur kokkalærlingurin.

Vinningurin var eitt gullheiðursmerki, ein kekkur frá Nordea á 1500 krónur, sjampagna og ein silvurborðiskur.

– Eg eri væl nøgdur. Tað hevur verið læruríkt og spennandi, og eg hevði væl kunnað funnið uppá, at gjørt tað umaftur, sigur Jóan Petur. Men hvørt tað hevði verið Nordjyllands Mesterskab fyri kokkalærlingar ella onkur onnur kapping, veit hann enn ikki at siga. Nú skal sigurin njótast eina løtu afturat. Í øllum førum til ferian endar mánadagin, og leiðin aftur gongur oman í køkin á Hotel Hafnia.

### Fakta

Jóan Petur á Stongunum hevur lært í 2 1/2 ár

Í lærutíðini hevur hann verið eitt hálvt ár umborð á skúlaskipinum Georg Stage

Eitt hálvt ár á Tekniska skúla í Danmark

Hálvt annað ár á Hotel Hafnia í Havn

Lærutíðin er tilsamans 4 ár

Einferð um árið eru lærlingarnir í skúla í 10 vikur

Lærumeistarin er Guðmundur Guðmundsson